## Drogba fyri Torres



Ensku stórfeløgini standa í bíðirøð eftir undirskriftini hjá spanska Fernando Torres. Leingi hevur ljóðað, at 22 ára gamli áleyparin er maðurin, sum skal loysa Ruud Van Nistelrooy av í Manchester United, men nú vil Chelsea eisini upp í leikin. Roman Abramovich hevur nú sagt, at hann vil geva meira, enn nakað boð hjá Manchester United kann ljóða uppá. Og seinasta tilboðið sigur, at Chelsea vil lata Didier Drogba umframt eina rúgvu av peningi til Atletico Madrid. Eisini hevur í seinastuni ljóðað, at Milan vil hava fatur á Torres, nú Shevchenko er farin til Chelsea.

**-mørk**

## Óli heldur fram í UEFA-nevnd

Føroysk FSF-umboð fingu fleiri nevndarsessir, tá UEFA herfyri hevði nevndarfund. Óli Holm, FSF-forseti, er afturvaldur fyri 3 ár sum nevndarlimur í ungdómsnevndini hjá UEFA. Niklas á Líðarenda, varaforseti, hevur fingið at vita, at hann framyvir skal virka sum altjóða dómaraeygleiðari, og Ísak Mikladal, aðalskrivari, er nývaldur nevndarlimur í nevndini, sum tekur sær av sonevndu Hattrick-ætlanini.

**-mørk**

Opið kríggj:

# HB togar FSF í rættin

**Áheitin er send fútanum um at seta fútaforboð fyri, at dysturin millum EB/ Streym og VB/Sumba verður spældur í annaðkvøld**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Stríðið um tað eftir hondini so væl kenda Páll Mohr Joensen málið hevur nú fingið enn eina tonn uppeftir. Mánakvøldið fingu umboð hjá FSF, VB/Sumba og EB/ Streymi vitjan av løgregluni, sum hevði innkalling til fútarættin við sær. Her hevur HB biðið um, at fútabann verður sett fyri dystinum á Eiði mikukvøldið, tí teir fyrst vilja hava greiðu á, hvørt tað er rætt, at teir vórðu dømdir at tapa dystin móti VB/Sumba tann 25. mars.

Í HB sigur Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur, at tey avgjørt ikki eru feign um hetta stigið, men at tey síggja hetta sum eina seinasta útveg.

– Verður dysturin á Eiði spældur í annaðkvøld, so óttast vit, at málið bara sleppur at glíða burtur. Kappingarnevndin hevur eisini fingið áheitanir frá eitt nú ÍSF um at flyta dystin eina viku, soleiðis at málið kann verða avgreitt innan fyri ítróttarligu karmarnar. Á sín hátt er hetta kanska eisini eitt úttrykk fyri maktarsloysi, tí vit hava snøgt sagt ongan annan útveg í málinum, sigur Steinfinnur.

Hann leggur tó afturat, at tað enn er møguleiki fyri, at landsrætturin ikki skal tala. Hetta um Kappingarnevndin aktar ynskinum um at flyta dystin á Eiði, soleiðis at Ítróttardómstólurin sleppur at tala í málinum.



*Vit óttast, at málið bara glíður út í sandin, um dysturin á Eiði verður spældur, sigur Steinfinnur Mittelstein, stjóri í P/F Havnar Fótbóltur*

### Ætla sær at møta

Ein av limunum í Kappingarnevndini er Karl Vidtfeldt á Sandi. Hann vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til málið í løtuni, men sum hann sigur, so møtir hann sjálvandi upp í rættinum.

– Í innkallingini, sum eg fekk, stendur rættiliga greitt staðfest, hvat hendir, um vit ikki møta upp. So tað ætla vit okkum sjálvandi at gera, er einasta viðmerkingin, sum hann hevur til seinasta stigið í málinum.

Mikumorgunin klokkan 11 skal fútarætturin so taka støðu til, hvat skal henda í málinum. Og líkamikið, hvør úrskurðurin verður, so er talan um nær sagt søguliga hending í føroyskum fótbólti. Talan er nevnliga um fyrstu ferðina í fjórðings øld, at kappingarmál í føroyskum fótbólti endar í sivilrættinum.

# Ritan hevur sama flogið

**Teir gáaðu ikki um strandadreingir, sum umborð á Strípuni vóru um reppið at snýta teir norðuri í Sundi**

5-MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Tað var um reppið, at tað kiksaði hjá Rituni, sum als ikki varnaðist hóttanina frá Strípuni*
*Mynd: Álvur*

Einasta manningin, sum í Vági endurtók sigurin av Skálafjørðinum, vóru dreingirnir umborð á Rituni.

Strípan av Strondum hevði undan Jóansøkuni havt vánaligt kappingarár. Hesa ferð fekk Strípan, sum lá langt frá teimum, ið tað hevur gingið væl hjá í undanfarnu kappingunum, besta startin. Eina løtu var Strípan eina bátslongd frammanfyri teir næstu. So javnaðist munurin, og tað tóktist sum um, at tað fór at enda soleiðis, sum tað hevði gjørt undanfarnar ferðirnar.

Ritan og Jallur lógu stavn um stavn, og Kollur var eina løtu fremstur av øllum. Undan endaspurtinum stakk Ritan seg framum aftur. Í endaspurtinum gekk Strípan framúr væl. Hálva bátslongdin fram til Rituna minkaði til skut og hálvan skut, og á málinum var munurin lítil og eingin.

– Vit høvdu eyguni eftir teimum, sum vit higartil hava kappast við. Vit vistu, at teir bátarnir vóru allir aftanfyri okkum. Vit hugsaðu ikki um Strípuna, sum lá langt úti í borðinum. Tíbetur vóru vit fyrri á mál enn teir, men tað var so akkurát, staðfestu væl nøgdu Ritu dreingirnir.

Jallur, Kollur og Havfrúgvin komu á mál mest sum stavn um stavn. Teir vóru hálva bátslongd aftanfyri teir báðar fremstu.

Ritan hevði sama flogið, sum hon hevði á Sundalagsstevnu og Eystanstevnu. Triðja plássið hjá Jalli kostaði teimum eyka stig í kappingini um FM, sum teir norðuri í Sundi nú liggja heilt væl fyri í. Ritan hevur ongantíð vunnið FM.

**5 mannafør dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ritan | 05:05.08 |
| 2 | Strípan | 05:05.10 |
| 3 | Jallurin | 05:07.16 |
| 4 | Kollur | 05:07.19 |
| 5 | Havfrúgvin | 05:07.21 |
| 6 | Sílið | 05:13.17 |
| 7 | Blikur | 05:15.10 |
| 8 | Drekin | 05:19.07 |



*Við sigrinum á jóansøku megnaði Knørrur at halda fast í leiðsluni, sum Ørvur annars var byrjaður at hótta*
*Mynd: Álvur*

# Knørrur segði takk fyri seinast

**Ørvur var ikki so ágangandi, sum tað kundi roknast við, eftir at teir í Havnar Róðrarfelag høvdu vunnið á Skálafjørðinum**

8-MANNAFØR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Róðurin á Vágs firði bendi á, at tað kanska fer at verða meiri spennandi í teimum trimum róðrunum, sum eru eftir, enn tað higartil hevur tókst, at tað skal verða.

Eftir sigrar í tveimum teimum fyrstu kappingunum noyddist Knørrur at lúta fyri Ørvi á Skálafjørðinum. Roknað varð við, at Ørvur aftur hesa ferð skuldi geva Knørri skarpan gang, men soleiðis myndaðist kappingin ikki.

Argjabáturin legði bragdliga fyri, og Nevið Reyða, sum í trimum teimum fyrstu róðrunum hevði verið væl aftastur, lá fitta løtu á næstfremsta plássinum.

So stakk Knørrur seg fram. Ørvur royndi at fylgja við, men tað gekk illa hjá honum at taka Argjabátin, meðan Knørrur so við og við økti um munin aftur til teir báðar næstu til eina bátslongd.

Knørrur helt tørn um munin aftur til hinar, og á málinum var hann klárt fremstur. Ørvur hevði harða kapping frá Argjabátinum. Bátarnir komu mest sum í senn á mál, men Ørvur var reingina undan Argabátinum.

Nevið Reyða, sum leingi fylgdi væl við, var hálva aðru bátslongd aftanfyri Ørv og Argjabátin.

– Um vit framvegis skuldu liggja best fyri í FM kappingini, so var neyðugt at vinna. Hesa ferð stemmaði tað væl hjá okkum, og nú eru vit fýra stig frammanfyri tann næsta. Um Ørvur hevði havt vunnið hesa ferð, og vit høvdu havt verið næstfremstir, so hevði stigatalið hjá okkum verið tað sama, og so hevði útgangsstøðan undan trimum teimum síðstu kappingunum verið tann sama, sum hon var undan Norðoyastevnuni. Tað er hon ikki nú, staðfesti væl nøgda Knørra manningin, sum á Vágsfirði rættuliga segði takk fyri seinast.

**8 mannafør**

1 Knørrur
04:37.14
2 Ørvur
04:40.09
3 Argjabáturin
04:40.12
4 Nevið Reyða
04:46.20